# Tað ræður eisini um at halda tørn



*- Vit hava eina effektiva umsiting á skrivstovu FF's, og her fáa fiskimenn ta hjálp og ráðgeving, sum felagið kann veita teimum, segði Óli Jacobsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Fiskimenn hava eisini síni áhugamál mótvegis almennum myndugleikum, og FF hevur havt stóra ávirkan á almenna fiskivinnupolitikkin. Høvdu vit ikki havt søkt okkum hjálp frá útlendskum fiskifrøðingum og serfrøðingum á økinum, tá ið ástóð, høvdu fáir fiskidagar verið eftir í dag, segði Óli Jacobsen á valfundinum**

FF-VALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var felagsformaðurin seinastu mongu árini, Óli Jacobsen, sum legði fyri á valfundinum á Vinnuháskúlanum seinasta fríggjadag.

Hann tosaði fyrst um tíðina, tá ið hann fyri skjótt 40 árum síðan kom í leiðslu FF's og fyri 36 árum síðan gjørdist felagsformaður.

- Neyðugt var at umskipa felagið á nógvan hátt, eitt nú tí ongar broytingar høvdu verið í viðtøkunum síðan 1938. Hesar broytingar høvdu eisini við sær, at felagsformaðurin fekk dagligu ábyrgdina av felagnum. Nú kundi ikki longur skyldast upp á nakran annan, um okkurt var at finnast at.

**Góð hagtalsskipan**

Óli segði, at sjálvandi er ymiskt, sum kundi verið øðrvísi og betri, treyðugt so, men felagið er munandi betri fyri – og er eisini munandi sterkari – enn tað áður hevur verið.

Hann nam við góðu hagtalsskipanina, sum FF hevur, og sum hann metir telist millum heimsins bestu.

- Her síggja vit gongdina – frá skipi til skip og ári til ár. Hetta fáa vit ikki umtalu fyri, men tølini geva úrslit, sum hann tók til.

At hagtølini hjá FF ikki geva umrøðu, er nú ikki heilt rætt, tí tey verða ikki so lítið brúkt av øðrum í metingum um útlit.

Men tað ger so ikki tølini verri.

**At verja borg**

Óli segði, at sum árini eru liðin, hevur eydnast FF at fáa í lag skipaði viðurskifti fyri allar veiðibólkar.

Men hinumegin ”borðið” hjá føroyskum fiskimonnum situr ikki bara reiðarin.

Felagsformaðurin vísti á, at fiskimenn eisini hava síni áhugamál mótvegis almennum myndugleikum, og hann metti, at FF hevur havt stóra ávirkan á almenna fiskivinnupolitikkin.

- Høvdu vit ikki havt søkt okkum hjálp hjá útlendskum fiskifrøðingum og serfrøðingum á økinum, høvdu fáir fiskidagar verið eftir í dag, legði hann dent á.

Óli segði, at stundum hevur verið neyðugt hjá felagnum veruliga at vart borg, sum hann tók til, og í hesum sambandi nevndi hann inntøkutrygdina og ágangin úr Danmark, har TV2 legið seg út í málið, men fekk veruligu viðurskiftini ”skeivt í hálsin”, sum hann tók til.

**Hjálp og ráðgeving**

- Vit hava eina effektiva umsiting á skrivstovu FF's, har umframt eg sjálvur eri, eisini eru tvey onnur skrivstovufólk. Her fáa fiskimenn ta hjálp og ráðgeving, sum felagið kann veita teimum.

Felagsformaðurin segði, at inntøkutølini vísa, at fiskimenn sum heild hava tað gott í dag.

- Ja, eg vil siga sera gott, legði Óli Jacobsen aftrat í sínum fyrsta innleggi á valfundinum.

# Ætlar sær at virka fyri fiskimenn



*- Hugburðurin mótvegis fiskimanninum er negativur. Tú verður næstan álopin av fólki, tá ið tú sigur, at tú ert fiskimaður, tí vit fiskimenn skulu hava tað so gott, segði Jan Højgaard á valfundinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Tá ið eg gjørdi av at fara aftur á skúlabonk, setti eg mær eitt mál. Málið var at gera nakað fyri fiskimenn, og hetta ætli eg mær at halda, segði Jan Højgaard á valfundinum**

FF-VALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jan Højgaard, sum í bókstavarøð er næsta valevnið á listanum til formansvalið í FF í ár, segði, at tað er ymiskt, sum honum liggur á hjarta, nú hann hevur gjørt av at stilla upp.

- Pensjónin hjá fiskimonnum er eitt av málunum; hon er ikki nøktandi – fyri ikki at siga eingin, sum hann tók til. Tryggingin er eftir mínum tykki eisini sera vánalig.

**Miljardir til góðar**

Jan hevur áður sagt, at fiskimenn eiga miljardir til góðar í landskassanum fyri heimatrygging av sjófólki, og hetta endurtók hann á valfundinum á Vinnuháskúlanum.

- Hendan peningin skulu vit hava aftur, og hann skulu ikki minst tey gomlu fáa, sum hann tók til.

Valevnið greiddi eisini frá, at hann sum fiskimaður fekk ein skaða í 2001, men tá føldi hann tað, sum var hann viðfarin sum brotsmaður.

- Eg noyddist regluliga at ”skriva undir”, sum hann tók til, men í realitetinum var einki at heinta, tí alt varð mótroknað.

**Fyri fiskimenn**

Seinni gjørdi Jan av at fara aftur á skúlabonk.

- Eg fór í skúla, tí eg ætlaði mær at gera nakað fyri fiskimenninar, og hetta ætli eg mær at halda, um eg fái høvi til tað, legði hann aftrat.

Jan segði seg hava lítið álit á tryggingarfeløgum, hóast hesi reypa sær av yvirskoti, sum hann tók til.

- Vit eiga eisini at taka eina uppgerð við ALS við at fara út í Tinganes og leggja trýst á myndugleikarnar.

Hann helt, at FF eigur at reka ein meira viðgongdan politikk – uttan, at hesin gerst ov ógvusligur.

- Vit eru lívsæðrin í samfelagnum, og tí eiga vit ikki at lata alt um okkum ganga.

**Negativur hugburður**

Jan helt, at hugburðurin mótvegis fiskimanninum í alt ov stóran mun er negativur.

- Tú verður næstan álopin av fólki, tá ið tú sigur, at tú ert fiskimaður, tí vit fiskimenn skulu hava tað so gott.

Hann helt, at Búskaparráðið og onnur slík forum einki gott hava at bera fiskimonnum.

Valevnið fýltist í hesum sambandi á, at eitt nú Hermann Oskarsson, sum hevur verið formaður í Búskaparráðnum og er stjóri á Hagstovu Føroya, ongantíð hevur sagt eitt gott orð um fiskimenn.

- Hetta líkist púrasta ongum, legði hann dent á.

**Keypa útvarpsrás**

Jan Højgaard helt, at fiskimenn – fyri betur at verða hoyrdir - skulu fáa sær eina útvarpsrás, sum eitt nú kann senda ein tíma um vikuna – eina rás, sum FF rindar fyri.

At enda í sínum fyrsta innleggi, helt hann, at tað ikki kann vera ábyrgdin hjá fiskimonnum, um reiðarar keypa skipini ov dýr.

- Hetta eigur ikki at vera okkara ábyrgd, legði valevnið aftrat.

# Óli syfti hinar sum ein vøtt



*- Tað eru langfarafiskimenn, sum hava bíðað eftir avrokning upp í tríggjar mánaðir, og hesa tíðina noyðast familjurnar av liva av forskoti. Tað er óvirðiligt. Eg haldi, at reiðarar eins og aðrir arbeiðsgevarar eiga at vísa fólki størri virðing, segði Dan R. Petersen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Teir, sum heittu á meg um at stilla upp ímóti Óla, hildu tað vera neyðugt, at mótvalevnið var ein skrivandi maður. Tað eru so nógvir, sum hava verið í holt við sitandi formann, men hann hevur syft teir sum ein vøtt, segði Dan R. Petersen, valevni**

FF-VALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Dan R. Petersen man vera tað valevnið til felagsformansvalið í FF hesaferð, sum hevur ført spískasta pennin, og serliga hevur hann funnist at sitandi formanni fyri – eftir sínum tykki - at hava gjørt ov lítið á ávísum økjum.

Dan hevur soleiðis havt nøkur ávís mál í síni valskrá, sum hann meinar liggja á láni hjá FF.

**Ítøkilig valskrá**

Á valfundinum legði hann dent á, at verður hann valdur í formansstarvið, skal sáttmálin haldast, fiskimenn skulu hava eina virðiliga pensjónsskipan, avrokningar skulu koma til tíðina, arbeiðsumhvørvið umborð á skipunum skal betrast, tryggingarviðurskiftini skulu betrast og fiskimenn, sum gerast arbeiðsleysir, skulu hava eina smidligari atgongd til ALS.

Dan nýtti eisini høvið at greiða frá sínari egnu bakgrund, nú hann hevur gjørt av at lata seg stilla upp.

- Eg eri uppvaksin í fiskimannaheimi og sigldi sjálvur sum blaðungur í nøkur ár, áðrenn eg fór á læraraskúla. Síðan havi eg altíð verið til sjós upp ímillum, eisini hesi seinnu árini.

**Hvassur pennur**

Valevnið segði, at tá ið heitt hevur verið á hann um at stilla upp, hildu menn tað vera neyðugt, at mótvalevnið til Óla Jacobsen, sum hevur sitið í 36 ár, átti vera ein skrivandi maður.

Tað eru so nógvir, sum hava verið í holt við sitandi formann, men hann hevur syft hesar sum ein vøtt, sum Dan tók til.

Í hesum sambandi nevndi hann bæði Ellint Patursson, Ísak Matras, Absalon Absalonsen og Dánjál Jákup Jørgensen, ið var hin seinasti, sum stillaði upp ímóti Óla fyri 18 árum síðan.

- Teir, sum hava heitt á meg um at stilla upp, hildu, at eg kundi geva sitandi formanni eitt virðiligt mótspæl, sum hann tók til.

**Vantandi virðing**

Í sínum valstríði hevur Dan gjørt nógv burtur úr, at ikki allir fiskimenn fáa sín ágóða til tíðina, og hann hevur eisini gjørt nógv burtur úr, at ikki allir reiðarar vilja gjalda fyri tað, sum menn gera, meðan skipið er í havn.

Dan hevur kanska serliga fýlst á, at summir reiðarar ”konsekvent”, sum hann tók til, ikki vilja gjalda fyri ístøku, ið kann taka einar 2-3 tímar.

- Tað er eingin meining í, at reiðarar skulu sleppa við ikki at rinda monnum tað, teir sambært sáttmálanum eiga.

Hann segði, at tað eru langfarafiskimenn, sum hava bíðað eftir avrokningini upp í tríggjar mánaðir, og hesa tíðina noyðast familjurnar av liva av forskoti, sum hann helt vera óvirðiligt í so langa tíð.

- Eg haldi, at reiðarar eins og aðrir arbeiðsgevarar eiga at vísa fólki størri virðing, legði hann dent á.

Dan segði, at tá tað í Íslandi ber til at avrokna manningina eftir tveimum døgum, sum hann tók til, átti hetta eisini at borið til hjá føroyskum reiðarum.

- Hetta er bert vantandi virðing, helt hann fyri.

**Lægri pensjónsaldur**

Valevnið helt, at tað ikki hevði verið meira enn rímiligt um fiskimenn, sum ofta eru útslitnir í rímiliga góðum árum, kundu fingið tilboð um pensjón nøkur ár fyrr enn vanligt.

- Eitt er tann kropsligi lparturin, annað er oyruni, og tað er valigt, at fiskimenn eru hálvdeyvir um fimmti ára aldur.

Dan R. Petersen segði, at teir, sum sigla við trolara, ofta liva undir ólýðiligum larmi, eitt nú av ketum og breidlum.